# Mál- og avrikssáttmáli millum

# Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Heilsumálaráðið

# 2015

## 1. Missión og visión

### Missión:

Viðgerðarheimið Heilbrigdi hevur til endamáls at virka sum viðgerðarstaður fyri rúsevnismisnýtarar.

### Visión:

Endamálið við viðgerðarheiminum Heilbrigdi á Velbastað er at vera viðgerðarstaður fyri rúsevnismissnýtarar. Viðgjørt verður sambært teimum 12 stigunum hjá AA, eisini kallað Minnisota-viðgerðin. Hetta gerst best við at knýta familjuviðgerð afturat verandi viðgerð í nýggjum hóskandi hølum og undir hóskandi umstøðum.
Til tess at røkka málinum er alneyðugt at styrkja og stimbra fakliga grundarlagið hjá øllum, sum starvast í Heilbrigdi.

### Fyri at røkka visiónini, skal Viðgerðarheimið Heilbrigdi:

- Altíð hava dagførda viðgerð
- Støðugt at menna stovnin
- Helst røkka øllum tørvandi misnýtaraum og familjum teirra
- Veita skjóta og fullgóða viðgerð
- Støðugt eftirmeta úrslitini

## 2. Inngangur:

Viðgerðarheimið Heilbrigdi varð sett á stovn í 1986, og verður virksemið fíggjað við eini rakstrarjáttan, ið verður latin stovninum við løgtingsfíggjarlógini.

Fíggjarjáttanin til Viðgerðarheimið Heilbrigdi í 2015 er 5.895 tús. kr. Fíggjarætlan verður løgd við ársbyrjan, so játtanin heldur alt árið.

Við støði í fíggjar- og starvsfólkaorkuni hjá Viðgerðarheiminum Heilbrigdi, verður løgd ein ætlan fyri, hvat verður raðfest í árinum.

Viðgerðarheimið Heilbrigdi hevur 9,5 ársverk.

Viðgerðarheimið Heilbrigdi avgreiðir øll sín fíggjarviðurskifti umvegis búskaparskipan landsins.

# 3. Kjarnuøki

## Viðgerðarheimið Heilbrigdi hevur hetta kjarnuøki:

1. At vera viðgerðarstaður fyri rúsevnismissnýtarar og øll teirra avvarðandi.

## Kjarnuøki umfatar:

- Tænasta til øll sløg av avrúsing og viðgerð
  - alkohol
  - alkohol og tablettir
  - alkohol, tablettir og hash
  - alkohol, tablettir, hash og narkotisk evni

# 4. Mál og tiltøk fyri 2015

| **Endamál** | **Støða** | **Mál í 2015** | **Tiltøk/Avrik** |
|---|---|---|---|
| Rúsevnispolitikkur | Heilsumálaráðið hevur skipað fyri hoyringsfundum | Luttaka í arbeiðinum hjá Heilsumálaráðnum at orða ein rúsevnispolitikk | Heilsumálaráðið skipar rúsevnispolitikkin |
| Menna hagtalsskipan fyri báðar Viðgerðarheimið Heilbrigdi og Blákrossheimið | Fundur hevur verið í Heilsumálaráðnum har semja við um at arbeiða víðari við málinum | Fara undir at skipa eins hagtalsskráseting á Heilbrigdi og Blákrossheiminum | Málið er at fáa eins skráseting møguliga í somu skipan |
| Roknskaparreglugerð | Eingin roknskaparreglugerð er gjørd. | At gera eina roknskaparreglugerð fyri Viðgerðarheimið Heilbrigdi, sum er týðulig og greitt lýsir øll viðurskifti um roknskaparhaldið hjá stovninum | Roknskaparreglugerðin verður liðug og góðkend í 2015 |
| Skeiðsvirksemi | Eftirviðgerðarskeið | Skipað verður fyri 10 eftirviðgerðarskeiðum í 2015 | Á hvørjum skeiðið verður pláss fyri 25-30 luttakarum |
| Skeiðsvirksemi | Familjuskeið | Skipað verður fyri 10 familjuskeiðum á 3 dagar í 2015 | Á hvørjum skeiðið verður pláss fyri umleið 10 luttakarum |
| Skeiðsvirksemi | Vikuskiftisskeið | Skipað verður fyri tveimum vikuskiftisskeiðum fyri starvsfólkum á Heilbrigdi | Øll starvsfólk luttaka á hvørjum skeiðið |
| Skeiðsvirksemi | Útbúgvingarskeið | Skipað verður fyri útbúgvingarskeiðum fyri ráðgevarar | Skipað verður fyri nøkrum skeiðum í 2015 |

**Virksemistøl**

| Ár | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | M2013 | M2014 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Innleggingar | 110 | 108 | 107 | 105 | 100 | 100 |
| Dagar | 2.758 | 2.833 | 2.803 | 2.800 | 2.800 | 2.800 |
| Dagar pr. innl. | 25 | 26 | 26 | 28 | 28 | 28 |
| Fólk í viðgerð 1. ferð | 58 | 57 | 63 | 53 | 60 | 44 |
| Fólk í viðgerð 2. ferð | 33 | 29 | 28 | 38 | 21 | 26 |
| Fólk í viðgerð 3. ferð ella meira | 19 | 22 | 16 | 14 | 13 | 13 |

**Sáttmálaskeið**

Hesin sáttmálin er galdandi fyri árið 2015.
Eftirmeting verður gjørd saman við aðalstjóranum í Heilsumálaráðnum á heysti 2015.

Tórshavn, tann 26. mars 2015

Viðgerðarheimið Heilbrigdi

Árni Rein, stovnsleiðari

Heilsumálaráðið

Turid Arge, aðalstjóri